


# Einabúgvin

**- Dagarnir teir bara flúgva avstað. Tað vísir seg, at eg havi altíð nóg mikið at gera, sigur 76 ára gamli Havgrímur Nielsen. Hann býr einsamallur í einastu sethúsunum við Toftavatn. Í hesum einbýlinum trívist hann sera væl.**

EINABÚGVI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Við Toftavatn:** Bilarnir fara súsandi framvið í erva. Her niðri við vatnið hoyrast teir kortini ikki.

Ljóðmyndin er hinvegin merkt av teim ljóðum, sum náttúran sjálv gevur frá sær – fuglurin, seyðurin og vindurin.

Í hesum umhvørvinum fær Havgrímur sín gerandisdag at ganga, nú aldurin er vorðin so høgur. Her hevur hann sítt býli, sín hjall og sítt seyðahús.



> *Eg eri ein slíkur klodsmajor, tí eg breyt mjødnina einaferðina tá eg datt*

- Her er ótrúliga gott at vera, sigur hann við Sosialin. Hann hevði neyvan viljað býtt um við eitt lív í einum stórbýi.

Havgrímur bygdi hesi húsini í 1965 og seinni eini onnur hús í Runavík. Eini slík hús sum hesi við Toftavatn hava sjálvandi brúk fyri viðlíkahaldi við millumbilum – eisini 42 ár seinni.

Nú veðrið er til vildar, er løtan komin til tað arbeiðið: Takið skal málast.

### Ikki serskøltur

Her við Toftavatn fær Havgrímur notið friðin og fuglalívið. Eitt lív, sum mong onnur helst munnu øvunda honum.

Hann hevur langan veg til næstu grannar sínar. Skal hann hitta teir, má hann fara annaðhvørt til Rituvík ella Runavík. Bil hevur hann ikki, men ein skutari er nóg gott flutningstól fyri hann.

Í fríløtunum lurtar hann eftir útvarpi, hyggur í sjónvarp og plagar at vera við, tá javnaldrar hansara hittast til hugnaløtur í eldrafelagnum Fløvin.

- Eg má ansa eftir ikki at gerast ein serskøltur, sigur hann við einum brosi.

## Seyðurin sigur frá veðrinum

**Hóast onkur kann halda, at tað man vera einsligt hjá Havgrími her við vatnið, so heldur hann sjálvur ikki tað.**

NÁTTÚRAN
*Snorri Brend*

Einaferð hann var til arbeiðis í Noregi hitti hann ein javnlíka í so máta – ein mann sum búði einsamallur langt inni í einum skógi.

- Ein dagin fór eg at vitja hann, og spurdi hann sama spurning sum tú nú spyrt meg: - Um tað ikki var einsligt og óinteressant at búgva soleiðis.

- Hann svaraði mær sera skilagott aftur: »Jú, tað var kanska eitt sindur einsligt. Men einbýlið varð ongatíð so høgt mett, at tað ikki var vert meiri!«, greiðir Havgrímur frá.

Ella sum orðatakið sigur: »Eingin metir einbýli við tað, tað er vert.«

Hesin maðurin sá fyrimunir við tí, at hann soleiðis slapp undan at lurta eftir slatri og gitingum frá fólki. Hann hevði náttúruna, fuglarnar og kriatúrini rundan um seg.

- Frá teimum fekk hann nógv størri sannleikar at vita, enn frá fólki, segði hann. Tað er nakað um tað, sum hann segði.

- Eg trívist í øllum førum væl her eg nú eri, sigur Havgrímur.

### Ferføttir veðurfrøðingar

Eitt dømi um hesar »sannleikar« eru veðurtíðindini. Í roynd og veru nýtist Havgrími ikki at lurta eftir útvarpinum.

Tá veðurtíðini koma í útvarpið, hava fuglarnir og kriatúrini langt síðani sagt honum, hvussu veðrið verður: Tá seyðurin liggur høgt, verður góðveður.

- Eg skal annars bara hyggja eftir, hvussu hann flytur seg. Kemur hann høgt, fer hann hendavegin, og kemur hann lágt fer hann handavegin, sigur hann og peikar á støðini, har seyðurin plagar at liggja.

- Hetta eru ógvuliga pálítilig veðurlíkindi. Her verður í øllum førum einki lagt aftrat!